Myndir: Beinta Haraldsen

# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo







# Klárt at bróta ljóðMúrin

Í gjár byrjaðu teir fyrstu festivalgestirnir at gera seg til reiðar til festivalin í Kirkjubø. Við Múrin er sostatt fari av bakkastokki, og við starvsfólkum, festivalgestum og tónleikarum verður Kirkjubøur á tremur við fólki næstu dagarnir.

Í gjárkvøldið var veðrið av tí fagrasta í Kirkjubø, men í morgun er støðan ein onnur. Tjúkt í mjørka bjóðar Kirkjubøur til sínar fyrstu tónleikaframførslur av hesum slag,

Hóast veðrið eru festivalgestirnir væl ávegis til at seta upp tjald og annað, og nógv eru tey, ið hava valt sær tjaldið sum gisting komandi dagarnir.

Fyrsta festivaldagurin verður merktur av føroyskum tónleiki. Við millum annað Guðrið Hansdóttir, Heiðriki, 200, MC-Hár og SIC á odda fyri tí føroyska partinum, byrjar dagsins tónleikur kl. 16.00 í dag. Á midnátt trínur fyrsta útlendska navnið á pall, og er talan um Trentemøller.

Trentemøller er ein danskur Dj, sum seinnu árini veruliga hevur gjørt um seg. Hann var eitt av høvuðsnøvnunum í Roskilde Festivalinum í ár, og nú er hann ávegis til Kirkjubøar.

Eftir hansara framførslu verður Dj-Show, og heldur tað fram til kl. 03.00, tá ið fyrsti festivaldagurin endar.





